*Hvítanes 2. februar 2019*

**Góði skjútti**

Skjótisamband Føroya (SKF) skipar í døgunum 19. 20. og 21. mai 2019, fyri venjingarlegu á skjótibreytunum hjá KFK í Keypmannahavn. Legan er fyri bæði trap- og skeet skjúttar.

Treytin fyri at sleppa við á venjingarlegu, er at skjútti hevur luttikið í tilsamans 5 almennum skjótikappingum í Føroyum, kalendaraárini 2017, 2018 og 2019. Umframt at skjútti skal verða limir í einum av limafeløgunum undir SkF, og hava síni limaviðurskifti í ordan.

Luttøkugjaldið er 1.000 kr.  pr. skjútta, sum skal flytast á konto 9181 4159154 í Betri Banka. Viðmerk navn á skjútta sum verður tilmeldaður.

Luttøkugjaldið skal verða goldið, í seinasta lagi týsdagin 30. apríl kl. 23:59.

SkF stuðlar við:

- 2.000 kr. til keyp av ferðaseðli
- 500 kr./dag til uppihald í 4 dagar (t.v.s. 2.000 kr. tils.)
- Dúgvur og lóður upp til 1.500 kr. tilsamans
- Venjingarlegu og leigu av høli og breyt

Skjútti samskipar sjálvur sín ferðaseðil og sítt uppihald.

Upplýsingar um hvussu søkt verður um loyvi at ferðast við byrsuni kemur seinni.

**Vegna Skjótisamband Føroya**

Esmar Joensen

SKJÓTISAMBAND FØROYA
skjotisamband@gmail.com
http://skot.fo